# ítróttur

Nr. 1 • leygardagur • 3. januar 2004 • 78. árgangur • www.sosialurin.fo

## Klárt til endaumfarið

Beint fyri nýggjárið varð greitt, hvørji mótstøðuliðini hjá Føroyum verða, tá endaumfarið í EM-undankappingini er á skránni í juni mánaði.

Sum kunnugt komu Føroyar og Skotland víðari úr okkara bólki, og í hinum bólkinum vórðu tað Cypros og Andorra, sum vunnu sær tey bæði fremstu plássini. Tey bæði liðini eru sostatt eisini við í pottinum í Luksemburg, har endaumfarið verður, eins og Luksemburg eisini er við sum vertsland. Kappingin verður í døgunum, 25. til 27. juni.

**-jm**

# Fýra ósigrar sum upphiting



*Heini Hanusarson varð við 17 málum besti málskjúttin í kappingini, nú føroyska manslandsliðið tók lut í Riga Council Cup*

## Jákup Mikkelsen hjálparvenjari í Klaksvík

**Landsliðsmálverjin Jákup Mikkelsen skal ikki bara verja málið hjá KÍ komandi árið. Hann skal eisini verða hjálparvenjari hjá Ove Flindt Bjerg**

FÓTBÓLTUR
*www.sportal.fo*

Tá ið Jákup Mikkelsen fyri jól kom aftur til Føroya at búgva, váttaði hann, at hann nú ætlaði sær at spæla við KÍ, men at eingin endalig avtala varð gjørd.

Hendan avtala er nú gjørd, og Jákup Mikkelsen skal bæði verða málverji og hjálparvenjari hjá KÍ.

Hetta segði formaðurin í KÍ, Gestur Hovgaard, í útvarpssendingini Heimabeiti týsdagin.

Sambært Gesti var tað ikki minst eftir ynski frá nýggja KÍ-venjaranum, Ove Flindt Bjerg, at Jákup Mikkelsen er settur sum hjálparvenjara.

## Føroyska manslandsliðið í hondbólti tapti allar dystirnar á ferðini í Letlandi

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Í døgunum millum jól og nýggjár tók føroyska manslandsliðið í hondbólti lut í kappingini, Riga Council Cup í Riga í Letlandi.

Mótstøðuliðini her vóru Estlandi, Letland og Finnland, og fyrst og fremst vóru dystirnir liður í fyrireikingunum til HM-undankappingina, sum stendur fyri framman.

Úrslitaliga var ferðin ikki tað heilt stóra at reypa av, tí Føroyar taptu allar dystirnar, sum vórðu leiktir á ferðini, og endaðu okkara sostatt niðast.

Fyri Letlandi tapti føroyska liðið 30-22, móti Estlandi varð úrslitið 33-25 og seinasta dystin móti Finnlandi tapti føroyska liðið 29-21.

Hartil var talan beint undan heimferðini um enn ein dyst móti Letlandi, og tó at tað gekst nakað betri hesaferð, so gjørdist talan um enn eitt tap. Hesaferð við 29-26.

### Tvey steyp

Hóast talan sostatt gjørdist um greið tap í øllum dystunum, so fóru føroyingar ikki heilt berir heimaftur. Heini Hanusarson skeyt tilsamans 17 mál í teimum trimum dystunum, og hetta gjørdi hann til toppskjútta í kappingini. Ein heiður, sum hann fekk virðisløn fyri.

Hartil fekk Sveinur Justinussen eisini serstaka virðisløn eftir kappingina. Hetta tí hann saman við trimum øðrum leikarum – ein úr hvørjum landi – varð kosin sum besti leikarin í kappingini.

Fyri framman standa so dystirnir í HM-undankappingini. Her stendur Noreg fyrst fyri tørni, og einki er at ivast í, at tað verður ein sera stórur biti hjá okkara monnum. Seinnu árini hevur Noreg lyft seg upp móti avgjørda heimstoppinum, og tí er einki at ivast í, at føroyska liðið av álvara kann fáa oyruni í maskinuna, um illa vil til. Fyrri dysturin móti Noreg verður á útivølli 7. januar, og 10. januar koma normenn so hendavegin.

16. og 18. januar eru Føroyar so í Rumenia, har báðir dystirnir móti teimum skulu fáast frá hondini.

## Dystir um vikuskiftið

**Hondbóltur**
**1. deild kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 03.01 | 14.30 | VB-Neistin |
| 04.01 | 14.30 | StÍF-Søljan |
| 04.01 | 14.30 | Kyndil-Stjørnan |

## 1. Deild kvinnur

| | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Stjørnan | 11 | 9 | - | 1 | - | 1 | 275 | 206 | 69 | 19 |
| 2 VÍF | 12 | 8 | - | 1 | - | 3 | 304 | 255 | 49 | 17 |
| 3 VB | 11 | 8 | - | 0 | - | 3 | 281 | 206 | 75 | 16 |
| 4 Neistin | 11 | 6 | - | 1 | - | 4 | 286 | 244 | 42 | 13 |
| 5 StÍF | 11 | 4 | - | 1 | - | 6 | 253 | 290 | -37 | 9 |
| 6 Søljan | 11 | 1 | - | 0 | - | 10 | 197 | 276 | -79 | 2 |
| 7 Kyndil | 11 | 1 | - | 0 | - | 10 | 173 | 292 | -119 | 2 |



# Sosialurin VARPIÐ

F R Í G G J A D A G U R 2. januar 2004



**Loser**
Paul er noyddur at arbeiða nógv fyri ikki at verða tveittur úr skúlanum. Hetta ger hann til ein tapara ímillum sínar veitslufegnu sambúgvar. Men so møtir hann tí vøkru Doru og brádliga sær alt so ljóst út – munnu tey fara at finna eydnuna saman?
**Mikudagin kl. 19.00**



**Greivin av Monte Cristo** CANAL+
Edmond Dantes sitir í fongsli, tí vinur hansara sveik hann orsakað av eini kvinnu. Eftir ellivu ár eydnast honum at flýggja. Nú gerst hann kendur sum tann loyndarfulli og hevnandi greivin.
**Fríggjadagin kl. 19.00**

**Loyniligu kríggini hjá CIA**
Amerikanska fregnartænastan, CIA, varð stovnað, eftir álopið á Pearl Harbor undir 2. Veraldarbardaga. Men aftaná álopini á USA tann 11. septembur í 2001 fór mann at hugsa um, hvørt fregnartænastan tænti sínum endamáli. CIA var í veruleikanum, nær við at vera deytt. Hvussu er hetta hent?
**Mánadagin kl. 18.35**

Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**